# Hey!

**Er tú ein ungur, ella ein "ungur" diabetikari ímillum 20 og 40 ár?**

So vilja vit fegin hitta teg í MBF húsinum 1. mars kl. 16.00, tí tá fara vit at bowla og hugna okkum við onkrum til matna aftaná.

Seinni ætla vit at skipa fyri fleiri tiltøkum, eitt nú át, prát og kaffi, fyrilestrum og o.ø.
Tit eru eisini vælkomin við uppskotum

Í felag kunnu vit gera alt nógv lættari

Ynskir tú at vera við, so vinaliga ring til ein okkara í seinasta lagi 23. februar

| Birita | Sarita | Rógvi | Guðrið |
|---|---|---|---|
| 264916 | 504424 | 224848 | 215886 |


## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður fríggjadagin 21. febr 2003.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Tíð og stað verður lýst seinni.

**Skála Handverkarafelag**
**Nevndin**


# SUN CITY í Fragd & Fimi

Allar sólirnar hava fingið nýggj rør.
Opið er: kl 7.00 - 23.00

**FRAGD & FIMI:**
Útsølan av PURE LIME klæðum er byrjað


## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Tvøroyrar Bóltfelag, sum lýstur var at verða leygardagin tann 15. februar, verður ístaðin sunnudagin tann 16. februar 2003 klokkan 16.00.

Skrá sambært lógini.

**Tvøroyrar Bóltfelag**


# HERBALIFE

Du bliver hvad du spiser
Vægtkontrolprogram - Kosttilskud
Ring (0045) 7022 2708 eller kig på www.helsetorvet.dk



# NÁTT-BUSSURIN
## hjá Øssuri Christiansen

*Koyrt verður leygarkvøld:*

**Vágaleiðin (tlf. 217753)**

| | |
|---|---|
| • Sørvágur - Tórshavn | kl. 23.00 |
| • Miðvágur - Tórshavn | kl. 23.15 |
| • Sandavágur - Tórshavn | kl. 23.30 |
| • Tórshavn - Vágar | kl. 04.30 |

**Vestmannaleiðin (tlf. 217752)**

| | |
|---|---|
| • Vestmanna - Tórshavn | kl. 23.30 |
| • Tórshavn - Vestmanna | kl. 00.30 |
| • Vestmanna - Tórshavn | kl. 03.30 |
| • Tórshavn - Vestmanna | kl. 04.30 |

**(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)**

**Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu**

**Tlf. 424254**



# Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,

**sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 229725 leygardag millum kl. 11 og 14**

**Prentmiðstøðin**








# BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo



# Baðirúms-møblar

SUPERBAD

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



vit flyta fyri virkir, stovnar og privat

FAROE TRANS
Vøruflutningur
50 69 69
e-mail: faroetrans@email.com

*Ring og fá eitt gott tilboð*



# Sosialurin



# FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við
Eyðfinn Jacobsen,
advokat
ella
Kára á Rógvi,
adv. fulltrúa
um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo



# Lesið Sosialin


**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur

Til psykiastriska Deild 1 verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,8 frá 1. mars 2003 ella skjótast gjørligt til og við 31. desember 2003.

Deildin er ein opin psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Á deildini eru bert sjúkrarøktarfrøðingar í starvi. Vit arbeiða tvørfakligt á einum høgum fakligum støði við teimum nýggjastu terapi-hættunum. Arbeiðsumhvørvið er áhugavert, krevjandi og hevur nógvar avbjóðingar.

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at ringja telefon 31 35 40, Susie Petersen, deildarleiðara, lokal 421 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 351 - e-post: bergitw@ahs.fo

**Umsóknarfreistin:**
Umsóknarfreistin er týsdagin 21. februar 2003 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn





Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰
annars sambært avtalu.

Vøruskrá kann fáast!


**Sjúklingahotellið Tórshavn**

Søkt verður eftir

# starvsfólki til køkin

## á Sjúklingahotellinum Tórshavn

Sjúklingahotellið søkir eftir einum kokki, økonomu ella køksassistenti 37 tímar um vikuna við vikuskiftisvakt 3. hvørja viku.

Viðkomandi má hava áhuga fyri at gera heilsugóðan mat til búgvandi á hotellinum.

Vit ynskja eisini, at viðkomandi er framsøkin og vil vera við til at menna arbeiðið í køkinum á Sjúklingahotellinum.

Arbeiðið fevnir um matgerð, innkeyp, ger av matarskrá og reingerð.

Í køkinum starvast 3 fulla tíð og ein hálva tíð.

Sjúklingahotellið Tórshavn er ein stovnur undir heilsumálaráðnum, ið hevur til uppgávu at hýsa føroyskum sjúklingum, sum eru í Danmark til viðgerð, og avvarðandi teirra.

Á hotellinum er pláss fyri umleið 70 búgvandi og her starvast 18 fólk.

Um tú vilt vita meira, ert tú vælkomin til at ringja til leiðaran Inu Frisdahl á tlf. +45 77 33 64 64 ella +45 21 67 72 90.

Løn sambært sáttmála millum Økonomaforeiningina og Keypmannahavnar Kommunu.

Umsókn við avriti av prógvum, skal sendast til:

**Sjúklingahotellið Tórshavn**
Tåsingegade 29, 5. sal
2100 København Ø
att. Ina Frisdahl
ella if-torshavn@get2net.dk

Umsóknarfreist: 20.02. 2003 klokkan 14.00.

# Avloysari sum Dagrøktari

Søkt verður eftir avloysara fyri dagrøktarmammu, í barnsburðarfarloyvi

**frá 01.03.2003 til 18.07.2003.**

Dagrøktarheimið skal verða innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í – og hóskandi, trygt spæliøkið uttanfyri.

Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi innan 13.02.2003.

Sørvágur tann 04.02.02.

**Dagrøktarskipanin í Sørvági**
380 Sørvágur
Tlf. 213122

**Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum**

# Skrivstovufólk

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum, MBF, søkir eftir skrivstovufólki at seta í starv frá 1. mars 2003 ella skjótast til ber. MBF er meginfelag fyri 22 ymisk feløg.

Talan er um eitt hálvtíðarstarv.

**Arbeiðsuppgávurnar verða m.a.:**
- telefonavgreiðsla og aðrar samskiftisuppgávur
- samskifti við limafeløgini
- journalisering/arkivering
- bókhald
- fyrireika fundir
- dagføring av heimasíðu
- annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

**Fakligt førleikakrøv:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving
- royndir og kunnleika til bókhald/roknskap
- góðan telduførleika
- hollur førleiki í føroyskum og donskum

**Persónlig førleikakrøv:**
- góð samstarvsevnir
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- er tolin, fyrikomandi og røkin.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir fylgir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til MBF skrivstovuna tlf. 317373 ella mail: mbf@mbf.fo

Umsókn við relevantum skjølum verður at senda til MBF, Íslandsvegur 10C, 100 Tórshavn í seinasta lagi 20. februar 2003.

**MBF**
Íslandsvegur 10c
100 Tórshavn

**Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku lýsir:**

# Høli til leigu

Rúmligu hølini í kjallarahæddini undir sambýlinum verða við hesum lýst til leigu.

Talan er um íalt 525 m² (42 x 12,5 metrar) við 3 m. millum loft og gólv, sum er lutvíst stoypt.

Løtt og sløtt atkoma frá Kjalarvegi.

**Fleiri upplýsingar kunnu fáast** við at venda sær til John Færø, býráðsskrivara, ella Hera M. Hammer, býarverkfrøðing, tlf. 41 00 00.

**Umsóknir** verða í seinasta lagi 21. februar at senda til:

**Sjálvsognarstovnin**
**undir Kráarbrekku**
**C/O Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2, 700 Klaksvík**

**Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku**